# Fleiri arbeiðstilboð úr Íslandi

Síða 7

tíðindablaðið sosialurin

7,-

Nr. 167 ★ leygardagur/sunnudagur
4./5. september 1993



Nýtt tilboð til tey smáu:

## Í bio ein fyrrapart

***Havnar Bio er aftur virkin, og hevur eisini barnafilmar á skránni. Í vikuni vóru øll børn íbarnagørðunum bjóðað í biograf at siggja Walt Disney filmin »Junglebogen«***

Síða 8

*Fakfelagið hjá lærarunum á Tekniska skúla:*

# Stevnir skúla og landsstýri

Síða 5

*Semja í Keypmannahavn:*

## Skipið gjørdi ikki kanningar á føroyskum øki

*Hetta er niðurstøðan í einum felags donsk-enskum tíðindaskrivi í sambandi við trætuna um Acadian Searcher. Henda avgerð gongur tí beint ímóti úttalilsunum hjá ovastanum á Marinustøðini í bæði Sosialinum og sjónvarpinum um, at skipið gjørdi kanningar innan fyri markið. Carsten Høgh, ovasti á Marinustøðini: -Hetta er ein politisk avgerð, og hana kann eg ikki leggja meg út í.*



*Tað var eingin slingur í valsinum, tá Carsten Høgh ovasti á Marinstuøðini setti út í kortið positiónina hjá Acadian Searcher. Mynd kalmar*

Seinnapartin í gjár skuldi eitt tíðindaskriv koma frá bretsku sendistovuni í Keypmannahavn og danska uttanríkisráðnum og góðkent av landsstýrinum, har tað stendur, at einki óregluligt er farið fram í nógv umrøddda seismikkmálinum. Acadian Searcher, sum Hvidbjørnen tók inni á føroyskum øki seinasta fríggjadag, var bert har fyri at venda. Skipið gjørdi ikki seismiskar kanningar innan fyri føroyska markið.

Hetta samsvarar annars ikki við tað, sum ovastin á Marinustøðini segði við Sosialin og sjónvarpið herfyri. Tá vísti hesin á, at skipið hevði alla útgerð úti og gjørdi seismiskar kanningar á føroyskum øki, tá Hvidbjørnen kom fram á tað.

Marita Petersen, løgmaður sigur, at landsstýrið als ikki hevur verið uppi í hesum máli, tí tað hevur ligið í uttanríkisráðnum. Hon leggur annars stóran dent á, at einki skal órógva tær annars vónandi positivu samráðingarnar, sum vera við Bretland um ein mánað.

### Leggi meg ikki út í eina politiska avgerð

Vit hava eisini biðið Carsten Høgh um eina viðmerking, nú einki meira verður gjørt við málið. Høgh segði annars við Sosialin leygardagin, at hann metti málið so álvarsligt, at tað var ikki rætt at taka skipið við til Havnar fyri har at gera tað til eina vanliga politisak. Tað átti harafturímóti at vera viðgjørt á hægsta politiska stigi.

Tað er tað nú. Men við tí úrsliti, at danir, føroyingar og bretar eru vornir samdir um, eftir at hava gjøgnumgingið skjølini í málinum, at Acadian Searcher var innan fyri mark men gjørdi ikki kanningar.

Carsten Høgh ynskir ikki at gera fleiri viðmerkingar í hesum máli. Hann vil ikki leggja seg út eina politiska avgerð.

Men úttalilsi hansara um at skipið gjørdi kanningar inni á føroyskum standa við. Politiski myndugleikin hevur tó valt at avgera hetta málið øðrvísi enn sjóverjuovastin metti fríggjadagin í farnu viku.

jan



*Seismisku skipini geva landsstýri og uttanríkisráði stórt hovuðbrýggi:*

# Bretar aftur innan fyri markið

*Hvidbjørnen biðið ensk skip fara út um mark fyri aðru ferð í eina viku*



*Carsten Høgh, ovasti á Færøerne Kommando og Cartsen Rasmussen, operationsofficerur eru her við at tekna inn á kortið, hvar tey útlendsku rannsóknarskipini eru í løtuni. Mynd kalmar*

Um somu tíð sum hendingin seinasta fríggjadag, tá eitt útlendskt skip gjørdi kanningar inni á føroyskum øki, er við at geva bæði føroyskum og donskum myndugleikum stórt høvuðsbrýggj, er danska sjóverjan nú aftur komin fram á tvey útlendsk skip, sum gjørdu seismiskar kanningar innan fyri føroyska fiskimarkið.

Skipini, Aurelia og Nordic Explorer, sum bæði arbeiða fyri ensku stórfyritøkuna BP, vóru alt fyri eitt biðin um at fara út um markið, og hesum boðunum aktaðu tey.

Hendingin fór fram seint týskvøldið longur eysturi og norðari frá tí økinum, har Acadian Searcher varð tikin seinasta fríggjadag

Carten Høgh, ovasti á Marinustøðini váttar, at skipini gjørdu seismiskar kanningar inni á sum hann kallar tað "uomstridt fær øsk fiskeriterritorium". Skipini vóru alt fyri eitt biðin um at fara burtur úr føroyska økinum og halda seg uttan fyri eina ávísa linju og hesum góðtóku tey og vendu við.

Upp á fyrispurning hvør munurin er millum hendingina seinasta fríggjadag og so hana týskvøldið sigur marinuovastin, at meðan Acadian Searcher bæði var innan fyri fiskimarkið og landgrunnsmarkið, so vóru skipini týskvøldið innan fyri fiskimarkið

Viðurskiftini longur eystari og norðari eru øðrvísi enn økið, har Acadian Searcher gjørdi kanningar. Her er nevniliga eingin Grá leið.

Danska sjóverjan hevur framhaldandi eitt vakið eygað við, hvat fer fram eystan fyri og sunnan fyri Føroyar. Vit frætta, at einki av teimum trimum umrøddu skipunum er á leiðunum har í løtuni

Nú tað tykist at vera komin spenl í onkustaðni í sambandi við at fáa av greitt alt hetta málið – málið liggur framvegis í verjumálaráðnum og er ikki komið víðari til uttanríkisráðið – spurdu vit Carsten Høgh, um Færøernes Kommando ov leingi hevur ligið á upplýsingum í málinum.

Tað er ikki her tað haltar. Her arbeiða vit skjótt og væl og um náttina eisini, er tað neyðugt

jan




*Pílurin til vinstru vísir nágreiniliga hvar Acadian Searcher var staddur fríggjadagin og pílurin til høgru hvar Aurelia og Nordic Explorer vóru stødd týskvøldið (her hava vit mett positiónina)*

*Hesi bæði kortini eru gjørd út frá upplýsingum, sum Sosialurin hevur fingið hendur á og vísa tey greitt, hvar Acadian Searcher varð staddur fríggjadagin, tá Hvidbjørnen kom fram á skipið. Og kortið vísir somuleiðis, at skipið var bæði innan fyri fiskimark og landgrunnsmark.*




